Helga Nordendal, Dráttur
– Hóast vit ikki leiktu illa í 1. og 2. setti, so taptu vit hesi, og hetta var eina mest tí, at TB leikti sera væl í verjuni. Eg kann ikki lata vera vi› at taka teirra libero Harriet Hammer framum, tí næstan líkamiki› hvar vit sló›u, so megna›i hon at fáa eina hond undir bóltin. Eisini høvdu vit trupulleikar at slá framvi› gó›a blokkinum hjá Selmu Danielsen.

Virgar Djurhuus, venjari TB
– Hetta var avgjørt besti dysturin hjá okum, og ta› var fyrst og fremst ein li›avrik, sum li›i› gjørdi í dag. Genturnar vístu vilja, og arbeiddu væl saman í verjuni, men okur skulu framvegis styrkja um okkara álopspart, og ver›ur hetta málsetningurin framyvir, tí um okur vunnu nakrar fáa bóltar frammi vi› neti› afturat, so kundi úrsliti› møguliga veri› annarlei›is í dag.

Dráttur–TB 3–2 (23-25, 22-25, 25-11, 25-16, 15-8)

Dráttur næstan tiki› av TB

Talan gjørdist um ein óvænta› spennandi dyst, tá TB um vikuskifti› vitja›i í Sørvági. Fimm sett skuldu til, á›renn dysturin hev›i funni› ein vinnara

FLOGBÓLTUR KVINNUR

Aftur hetta vikuskifti› høvdu Dráttur-kvinnunar heimavøll í Sørvági, av tí at høllin á Giljanesi var upptikin vi› ø›rum tiltøkum. Og eftir at tvey sett vóru leikt, rokna›i ein vi›, at hetta var orsøkin til, at tær vóru aftanfyri 2-0 í settum, tí ta› eydna›ist TB at vinna hesi á oddali›num.

TB-li›i› var ikki at kenna aftur frá teimum seinastu dystunum, - framgongd hevur veri› alla tí›ina-, men í teimum avgerandi løtunum er li›i› falli› saman. Men solei›is var ikki leygardagin

Gó›ur libero í Harriet Hammer

Hóast Dráttur hev›i nógv gó› álop, so vísti ta› seg, at ta› altí› kom ein TB-armur í vegin, og í hesum verjuleikinum var ta› serliga liberoin hjá TB, Harriet Hammer, sum skara›i framúr vi› sera nógvum bjargingum, men eisini Ann Mari Støm, vísti gott spæl í verjuni.

Helga Nordendal og Marina úr Drátti, sum leiktu á mi›juni tvey tey fyrstu settini, høvdu tí stórar trupulleikar at vinna bóltarnar, og ta› var ikki lættari, tá Selma Danielsen, TB, hev›i ein gó›an dag í blokkinum.

TB vann tvey tey fyrstu settini 25-23 og 25-22, har ein av høv›usørsøkunum til sigurin var li›arbei›i og gó›ur vilji.

Broyttu uppstilling

Dráttur var nú næstan falli› saman. Men ein seinasta roynd var gjørd undan tri›ja settinum vi› at broyta upp á uppstillingina. Elisabeth Rasmussen b‡tti um vi› jugoslavan Marinu á mi›juni, og hetta vísti seg at geva úrslit. Elisabeth leikti væl á mi›juni og Marina kom rættuliga til sín rætt á kantinum. Og nú kom gongd í hjá Drátti, og setti› var vunni› vi› settmuninum 25-11. Ein rættuliga stórur munur, og vísti hevarin hjá Drátti, Tórun Jónsdóttir, gott og væl skipa› spæl í hesum settinum.

Og tvey tey næstu settini fóru sama veg, og Dráttur vann hesi 25-16 og fimta og seinasta setti› 15-8., og harvi› dystin 3-2.

Li›i› er tí framvegis á odda í kappingini, og komandi vikuskifti skal li›i› til Havnar at leika ímóti Fleyr, sum liggur á tri›ja plássi.

Flogbóltur, úrslit og stø›ur

Úrslit um vikuskifti ›

MK	Dráttur	TB	3-2
MK	ÍF	Fleyr	2-3
MM	SÍ	Fram	0-3
MM	ÍF	Fleyr	1-3

Stø›an, Meistaradeild Menn

Li›	Dystir leiktir	Dystir vunnir	Dystir taptir	Sett vunnin	Sett tapt	Sett munur	* Stig
Mjølnir	6	5	1	17	7	10	10
ÍF	6	4	2	14	8	6	8
Fram	7	4	3	16	12	4	8
Fleyr	6	3	3	11	12	-1	6
SÍ	7	0	7	2	21	-19	0

Stø›an, Meistaradeild Kvinnur

Li›	Dystir leiktir	Dystir vunnir	Dystir taptir	Sett vunnin	Sett tapt	Sett munur	* Stig
Dráttur	8	7	1	23	7	16	14
Mjølnir	7	6	1	19	6	13	12
Fleyr	8	5	3	16	14	2	10
ÍF	8	3	5	12	17	-5	6
TB	8	2	6	14	19	-5	4
Fossánes	7	0	7	0	21	-21	0

Forma›ur javnt ímóti stórmeistara

Kollfir›ingar hava heili tveir stórmeistarar á teirra styrkilista, danin Henrik Danielsen og sviin Tiger H. Persson. Hesin seinri var vi› á li›num í útsetta dystinum ímóti klaksvíkingum leygardagin, men megna›i tó ikki at vinna á formanni talvsambandsins, Rana Nolsøe. Í heili 100 leikum royndi Tiger at vinna.

TALV
Carl Eli Nolsøe Samuelsen

Forma›urin í talvsambandinum, Rani Nolsøe, var partur av einum sonnum marathon-talvi móti Tiger H. Persson

Ótrúliga javnt er í oddinum í fyrstu deild í ár. Bert hálvtri›ja stig er ímillum fremsta og aftasta li›.

Útsetti dysturin frá fyrsta umfari, KTF-KT, enda›i vi› sannførandi sigri til klaksvíkingar. Rani hev›i svarta fólki› ímóti GM Tiger H. Persson, har Tiger kom betri frá byrjanini. Rani fekk avvikla› stø›una til púra javnt, men Tiger treiska›ist, og ikki fyrren hundra› leikir vór›u leiktir mátti hann taka til takkar vi› javnleiki. Eitt óvanliga gott úrslit hjá Rana.

Dysturin enda›i 3-1 til klaksvíkingar. Steintór Rasmussen og Hans K. Simonsen leiktu somulei›is javnleik, me›an Tummas M. Anthoniussen og Ingolf Gaard vunnu á ávíkavist Bernhardi Thomsen og Grettir Djurhuus.

Sigurin førka›i klaksvíkingar upp á eitt deilt tri›ja pláss undan tri›ja umfar sum bleiv leikt sunnudagin.

John Rødgaard gjørdi somulei›is bart

Í kollafir›i hittust kollfir›ingar og vestmenningar. Dysturin enda›i vi› 2,5-1,5 sigri til heimali›i›.

Ei heldur hesafer› eydna›ist ta› hjá Tiger at vinna. Yvir av honum sat nevnliga John Rødgaard, og hesin fekk hegnisliga hála javnleikin heim.

Tiger hevur sostatt ikki havt eitt serliga eydnuríkt vikuskifti vi› bert tveimum javnleikum.

Á ø›rum bor›i hjá vestmenningum vann Torbjørn Thomsen á gamla li›felagnum Hans Kristian Simonsen. Torbjørn hevur sí›ani skifti› til Vestmanna Talvfelag vunni› øll síni tr‡ talv á ø›rum bor›i.

Gongur væl hjá fremru bor›unum hjá VT, so kann ikki sigast ta› sama um tri›ja- og fjór›a bor›. John Jacobsen er ikki veruliga komin í gongd enn, og sunnudagin tapti hann ímóti Bernhard Thomsen.

Kári Durhuus tapti somulei›is á fjór›a bor›i ímóti Grettir Djurhuus.

Sjálvt um Tiger ikki hevur vunni› enn vi› kollfir›ingum, so liggja teir á odda saman vi› hvalvíkingum.

Luitjen Apol vi› aftur

Í Havn var› toppdystur ímillum havnarli›i› og li›i› úr Hvalvík-Streymi, TFS. Havnarmenn hødvu enn ikki megna› at vunni› ein dyst, men hinvegin høvdu teir ikki tapt nakran undan hesum dysti. Einki broyttist tí, tá teir fingu 2-2 ímóti hvalvíkingum.

Herluf Hansen hevur ikki fingi› eina hepna byrja í ár. Hann tapti á fyrsta bor›i ímóti Martin Brekká. Martin fekk beinanvegin betri stø›u og vann trygt.

Unga stjørnuskoti› Olaf Berg, fekk sína roynd tá hann á ø›rum bor›i møtti Finnbjørn Zachariassen. Talvi› var› sera rótut, Olaf hev›i kanska munin, men javnleikur bleiv at enda úrsliti›.

Fyrrverandi føroyameistarnir, Andrias Ziska og Luitjen Apol, manna›u tri›ja- og fjór›a bor› høvu›sta›arli›num. Andrias telva›i væl ímóti Sámal Christiansen, og hev›i nærum vunna stø›u tá Sámal kom í tí›arney›, og tískil vann Andrias lætt.

Luitjen og Gunnar Joensen leiktu javnt á fjór›a bor›i.

Úrsliti› ber í sær, at hvalvíkingar framvegis eru í toppinum.

Tí›in reyk

Í Klaksvík komu sandavágsmenn á vitjan. Dysturin enda›i óvænta› 2-2.

Rani sum dagin á›renn hev›i fingi› javnt ímóti Tiger, hev›i hesafer› Torkil Nielsen sum mótstø›umann. Rani fekk gó›a stø›u, men kom í svára tí›arney›. Beint sum leikur fjøruti skuldi flytast fall pinnurin hjá Rana, og Torkil vann sostatt talvi› uppá tí›.

Steintór vann sikkurt ímóti Bernhard Augustinussen á ø›rum bor›i, me›an Tummas M. Anthoniussen enn einafer› vann. Hann vann á Hera Christoffersen.

Bró›ir Torkil, Sonni Nielsen, vann eitt fløkjasligt talv á fjór›a bor›i ímóti Ingolf Gaard.

Eitt skuffandi úrslit hjá klaksvíkingum, har teir høvdu møguleikan at koma á ovastu rók undan jólaste›gin.

Fjór›a umfar ver›ur telva tann 6. januar í tí n‡ggja árinum.

2. deild

Í a›ru deild liggur HT 2 trygt á odda. Teir vunnu tepran sigur ímóti gøtumonnum, og hava nú lagt seg tvey stig á odda.

Runavíkingar vi› Ólavi Simonsen á odda, taptu fyri toftamonnum. Veteranurin Helgi Joensen átti at vunni› ímóti Ólavi, men Ólavur fekk strí›st seg til javnt. Eitt gott úrslit hjá Helga. Landsli›sleikarin í fótbólti Øssur Joensen dugir anna› enn at brúka beinini; hann vann nevnliga sítt talv á tri›ja bor›i ímóti Brandur Jacobsen.

HT 2 liggur klárt á odda, men hitt li›i úr Havnini, HT 3 er í longu nú í trupulleikum. Teir taptu heili 3-1 ímóti KTF 2, og liggja nú púra einsamallir í botinum.

Í 3. deild stendur kappingin millum tvey li›, VT2 og HT4, har vestmenningar føra vi› hálvum stigi.

FIDE HM

Í skrivandi løtu er 3. umfar í Knock-Out HM í gongd. Mannagongdin er at telva› ver›a tvey talv, og vinnarin av hesum dysti fer sí›ani ví›ari, me›an taparin fer heim.

Undantiki› Kramnik og Kasparov, so luttaka Anand og allir hinir sterku stórmeistarnir. Vinnarin av 3rd Tórshavn International Alexander Grischuk hevur yvirraska› vi› at koma ví›ari til 3. umfar. Ponomariov bleiv hinvegin longu í fyrsta umfari útsligin av vietnamesara, sum John Arni Nilssen megna›i javnleik ímóti í Talvolympiaduni herfyri.

FIDE heimsmeistaraheiti› ver›ur telva› í New Delhi, India, og finalumførini ver›a flutt til Teheran, Iran. Fylgjast kann vi› á http://wcc2000.fide.com

1. Deild

KTF	**KT**	**3–1**
Rani Nolsøe	GM Tiger Hillarp Persson	0.5–0.5
Steintór Rasmussen	Hans K. Simonsen	0.5–0.5
Tummas M. Anthoniussen	Bernhard Thomsen	1–0
Ingolf Gaard	Grettir Djurhuus	1–0
HT	**TFS**	**2–2**
Herluf Hansen	Martin Brekká	0–1
Olaf Berg	Finnbjørn Zachariasen	0.5–0.5
Andrias Ziska	Sámal Christiansen	1–0
Luijten Apol	Gunnar Joensen	0.5–0.5
KT	**VT**	**2.5–1.5**
GM Tiger Hillarp Persson	IM John Rødgaard	0.5–0.5
Hans K. Simonsen	Torbjørn Thomsen	0–1
Bernhard Thomsen	John Jacobsen	1–0
Grettir Djurhuus	Kári Durhuus	1–0
KTF	**ST**	**2–2**
Rani Nolsøe	Torkil Nielsen	0–1
Steintór Rasmussen	Bernhard Augustinussen	1–0
Tummas M. Anthoniussen	Heri Christoffersen	1–0
Ingolf Gaard	Sonni Nielsen	0–1

Stø›an eftir 3. umfar

1. TFS, Hvalvík	7
2. KT, Kollafjør›ur	6.5
3. KTF, Klaksvik	6
4. HT, Tórshavn	6
5. VT, Vestmanna	5.5
6. ST, Sandavágur	4.5

2. deild

RT	**TT**	**1.5–2.5**
Ólavur Simonsen	Helgi Joensen	0.5–0.5
Meinhard Danielsen	Wensil Højgaard	0.5–0.5
Brandur K. Jacobsen	Øssur Hansen	0–1
Rúni Jacobsen	Jógvan M. Olsen	0.5–0.5
HT 3	**KTF 2**	**1-3**
GT	**HT2**	**1.5–2.5**
John Joensen	Jóhan Gaard	0–1
Reinhold Isaksen	Michael Jensen	0.5–0.5
Jákup F. Joensen	Poul Poulsen	0.5–0.5
Heri Thomsen	Jógvan Næs	0.5–0.5

Stø›an eftir 3. umfar

1. HT 2, Tórhavn	8.5
2. TT, Toftir	6.5
3. KTF 2,Klaksvik	6.5
4. GT, Gøta	6
5. RT, Runavík	5.5
6. HT 3,Tórshavn	3

3. deild

Rókur	**KTF 3**	**0.5–3.5**
Petur Sumberg	Vagn Heldarskar›	0–1
Árni M. Dam	Atli Jacobsen	0–1
Jeffri Jensen	Mannbjørn Antoniussen	0–1
Dánjal P. Olsen	Jan Simonsen	0.5–0.5
VT 2	**HT4**	**1.5–2.5**
Jón Mikkelsen	Øssur Joensen	0.5–0.5
Jákup á Rógvi Andreasen	Jákup A. Jensen	0–1
Niels O. Durhuus	Jákup D. Joensen	0.5–0.5
Virgar Hansen	Herfinn Seloy	0.5–0.50

1. VT 2, Vestmanna	8
2. HT 4, Tórshavn	8.5
3. KTF 3, Klaksvík	6
4. Rókur, Oyri	5
5. KT 2, Kollafjør›ur	4.5
6. VT 3, Vestmanna	0

Vit umboða
Harm-Danmark Aps
Vetus-Deutz-bátamotorar
Vit útvega allar eykalutir til skip og bátar
Generatoranlegg 4,5-520 kva.
Gear-Skrúvuakslar-Stevirør-Propellir.
Hava samband við 25 ára spesialverkstað í Renovarar Propellir í messing, aluminium, bronsa, rustfríum stáli og stoypigøs.
J. M. MOTORAR OG EYKALUTIR
370 Miðvágur • Tel. 33 23 92 • Fax 33 36 92

Coca-Cola
COCA - COLA CUP
B68 bjóðar øllum gentum og dreingjum at gera lið til kapping í fótbólti í ítróttarhøllini í Runavík í døgunum 9. og 10. desember 2000
Reglur o.a.
- Spælt verður við stórum málum (smápiltamálum).
- Á hvørjum liði eru 5 leikarar, 4 útileikarar og 1 málmaður.
- Loyvt er at hava 1 eykaleikara.
- Luttakarakostnaður: kr. 200,- fyri hvørt liðið.
- Øll liðini skulu hava rættulig fótbóltsnøvn, sum t.d. B68, HB, Liverpool, Pharma osfr.
Sosialurin - 311820
Aldursbólkar
1. Pinkulingar (f. 93 og yngri)
2. Smápiltar (f. 91-92)
3. Piltar (f. 89-90)
4. Smádreingir (f. 87-88)
5. Dreingir (f. 85-86)
6. Gentur (f. 91 og yngri)
7. Gentur (f. 89-90)
8. Gentur (f. 87-88)
9. Gentur (f. 84-86)
Tilmelding
Fer fram á tel. 448748/ 448082 og 448199 millum kl. 19.00-21.00
Seinasta freist mikukvøldið 6. desember.
Heiðursmerkir o.m.a. frá Coca Cola
- Heiðursmerkir til nr. 1, 2 og 3
- T-shirts til nr. 1 í hvørjum bólki
- Coca Cola til allar leikarar
Stuðul til kappingina
Coca-Cola
Tofta Ítróttarfelag

Klaksvíkar Bókasavn
søkir eftir
tímaløntum hjálparfólki
at arbei›a fulla tí› í tí›arskei›num 1. januar–15. juli 2001.
Arbei›i› fevnir m.a. um dagliga arbei›i› á bókasavninum, so sum í avgrei›sluni og annars alt fyrifallandi arbei›i.
Søkt ver›ur eftir persóni:
- vi› kunnleika til n‡tslu av EDV
- i› dugir at arbei›a sjálvstø›ugt
- i› er ágr‡tin og fyrikomandi
Nærri fæst at vita um starvi› vi› at venda sær til Anniku Egholm bókavør› á Klaksvíkar Bókasavni.
Umsóknir ver›a at senda til:
Kl. Bókasavn
Postboks 45
700 Klaksvík
Umsóknarfreistin er 18. desember 2000.
Klaksvíkar Kommuna

Skattalistin 1999
Skattalistin fyri Vágs Kommunu liggur frammi til alment eftirlit á B‡rá›sskrivstovuni frá 04. desember til og vi› 14. desember 2000.
Vágs kommuna
Vágur, tann 01. desember 2000

L‡sing vi›v. upptøka til búpláss á Eldrasamb‡linum í Hvalba
Í sambandi vi›, at Eldrasamb‡li› í Hvalba væntandi ver›ur klárt at taka í n‡tslu um hálvan januar 2001, fáast umsóknarblø› til búpláss vi› at venda sær til:
Kommunuskrivstovuna í Hvalba
Tlf. 375033
Heimarøktin
Upptøkunevndin
FO-900 Vágur

REINAN BIL !
- Vit avfeitta og vaska
- Vaska innan sum uttan
- Bona, polera o.a.
- Vit heinta og seta bilin aftur
Sport Wheels, tel. 253352
Gripsvegur 26. Ringið og fái eina tíð. Opið kl. 8 - 20

Lýsið í sosialinum